KETTLINGAR
Tveir sera fittir og reinligir kettlingar verða latnir djóravinum.
Tlf. 313975

KETTLINGUR
Ein sera fittur, svartur/hvítur kettlingur verður latin djóravini.
Tlf. 442028, e. kl. 18

KETTLINGUR HORVIN
3 mør. gamal, svartur og brúnur stríputur, sera spakur, burturblivin 31. juli í Tórugøtu í Havn.
Tlf. 220260 - 316531

KETTLINGUR HORVIN
3 mør. gamal, svartur og hvítur, sera spakur kettlingur bleiv burtur 24. juli í Hoyvík.
Tlf. 310995 - 221628

PUDDILHUNDUR
Ein 1 1/2 ára gamal puddilhundur, góður at fáast við og reinligur, verður latin djóravini vegna flyting.
Tlf. 250926

SVARTUR FRENSUR
tikin upp á Argjum. Hevur tvílitta nøs, hvíta blett høgrumegin, hvítar labbar og er sera spakur.
Tlf. 319961

TIL SØLU
Dvørgahamstraraungar til sølu fyri 20 kr. stk.
Tlf. 316640, Bjarni

TIL SØLU
Hamstarabúr í tveimum hæddum og rennihjóli til sølu fyri kr 200.
310319 ella 210319

UNDULATAR
til sølu.
Tlf. 314434

ZEBRAFINKUR
til sølu.
Tlf. 314434

Húsarhaldstól

YNSKIST
Bíligt, brúkt køliskáp ynskist til keyps.
Tlf. 317481

Innbúgv

DUPULTSONG
140x200, við nýggjum madrassum, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 314129 - 316622

SPÍSIBORÐ
Gott borð v/ 4 stólum til sølu fyri 500 kr. Lítið brúkt.
Tlf. 212027

TELDUBORÐ
við hillum og skuffu, std. 75x160 cm, sum nýtt, til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 317602 - 282602

TIL SØLU
Vatnsong, 200x200, 1.000 kr. Tvær ljósar, 3 ára gamlar 3-manssofur, 500 kr. stk.
Tlf. 422335 - 225125

TIL SØLU
Ein brúkt etagusong úr ljósum træi, við madrassum, sær gott út, til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 10962 - 210962

TIL SØLU
Tvær 3 ára gamlar, ljóst blomstrutar 3-mans sofur til sølu fyri 500 kr. stk.
Tlf. 225125 - 422335

Lutaseðlar

1.q. Á KLAKSVÍKAR HF-SKEIÐI
Drátturin av lutaseðlunum, ið skuldi verða 3. august, er útsettur til 30. august.
1.q.

Pløgg

TIL SØLU
Nýggj, góð og óbrúkt klæði til sølu til unga gentu/kvinnu.
Tlf. 315760, Sóleyð

TIL SØLU
Nýggjur føroyskur kvinnubúni til sølu.
Tlf. 314928

TIL SØLU
Motorsúkklujakki til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 318428

TIL SØLU
Lítið brúkt skjúrt til føroysk klæði, std. uml. 36, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 317484

TIL SØLU
Troyggja til før. kvinnubúnan, reyð/svørt/grøn, std. 38, til sølu fyri 1.000 kr. Hvítt vovið turriklæði og fyriklæði, std. 12-14 ár, til sølu fyri 500 kr. Reytt/svart skjúrt, std. 12-14 ár, til slu fyri 1.500 kr.
Tlf. 315723

TIL SØLU
Silvur til føroyska kvinnubúnan til sølu fyri 2.400 kr. Óbrúkt. Brosja, 8 mallur og beltspenni. Mynstur „Torgerð" frá Torgerð Suðuroy.
Tel. 212790

Samband

HYGGIÐ HER KVINNUR Í 50'unum!
Eg eri 57 ára gamal maður og eg ætli mær at fara ein túr við Norrønu. Ert tú áhugað kunnu vit fara saman, kanska Harmonikutúrin. Skriva til:
Sosialurin, Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 144.87

SAMBAND YNSKIST
Eg eri ein maður fyrst í 60-unum og eg ynski at koma í samband við kvinnu í 50-60 ára aldri. Havi egin hús og arbeiði. Hevur hetta tín áhuga, skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 148.073

Súkklur

DREINGJASÚKKLA
Winther 24" fjallasúkkla til sølu fyri 1.500 kr. ella í býti við stórri súkklu.
Tlf. 373402

FJALLASÚKKLA
Hvít, italiensk »Vuelta« fjallasúkkla við 24 gearum til sølu fyri 1.750 kr. Tvey ára gomul.
Tlf. 310177

MOTORCROSS
Ein motorcross av slagnum Yamaha DT 125 ccm verður latin fyri ein sámuligan prís. Motorcrossin sær gott út og er í góðum standi, eisini koyrir hon væl.
Tlf. 315617, e. kl. 17

SCOOTARI TIL SØLU
Ein 4 mør. gamal Honda scootari, 50 cc, verður seldur vegna flyting.
Ring 314175/214175
Spyr eftir Pætur

SCOOTARI TIL SØLU
Ein 3 mør. gamal Aprilia scootari 50 cc, hevur koyrt uml. 2400 km, sær sera gott út, til sølu.
Tlf. 451006 ella 288106

SÚKKLA TIL SØLU
DBS Kilimanjaro 26" súkkla til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 317298 - 282098

TIL SØLU
Súkkla til uml. 5-8 ár, 300 kr.
Tlf. 318428

TIL SØLU
20" dreingjasúkkla v/ 5 gearum.
Tlf. 332244

YNSKIST
Hevur tú ein brúktan scootara, ið tú ætlar at selja, ring so
Tlf. 310035 ella 210135

Teldur

FARTELDA TIL SØLU
Toshiba Satellite 2520 CDS. 300 MHz 13,0 DSTN skerm, 32 mb ram, 24 speed cd-rom, 56 KBPS data/fax modem, lítið brúkt og vælhildin.
Tlf. 217151, e. kl. 17

IBM FARTELDA
133 MHz, 78 MB ram, 2,1 Gb harddisk, sera góðan litskerm, Windows 95, Office, Word, Excel, power point fylgja við. Nýprísur í Danmark 14.900 kr., til sølu fyri 5.900 kr.
Tlf. 332690

Tónleikur

25" ITT
sjónvarp til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 312270

KLAVER TIL SØLU
Gott Wurlitzer klaver, L=143 cm, H=107 cm, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 316720 - 216720

TIL SØLU
Tveir hátalarar av merkinum Zomax 250 w. Sterkur 15" bassur við stórum svingspola, diskanthorn við útskiftiligum membrani, 115 liturs kabinett, h. 80, br. 47 og d. 40 cm, til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 312048, eftir arbeiðstíð

TIL SØLU
Marantz kassettuband spælari í góðum standi til sølu fyri 800 kr. Tilhoyrandi grafiskur equalizari 200 kr.
Tlf. 318227

TIL SØLU
Bjarnastein hondgjørdur el-gittari til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 311898

TIL SØLU
Ein guitarforsterkari av slagnum VOX AC 30 til sølu fyri 14.000 kr. Nýprísur 17.000 kr.
Tlf. 314384 ella 220425

TIL SØLU
Lítið brúktur Korg OW101 synthesizar Workstation við kufferti til sølu fyri 10.000 kr. Nýprísur 21.500 kr.
Tlf. 361687

TRUMMUSETT TIL SØLU
Yamaha Stage Custom, 5 trummur og 5 zilddjian skálir, hardcase kassar til trummurnar og stativ. 4 1/2 mør. gamalt.
Tlf. 456730

ÚTSØLA
Ein Fender Stratocaster guitari, ein Aquarius guitari, eitt Marshall Vintage 1960 kabinett, Ein Marshall JCM900 toppur, ein Marshall 9000 rørslava, ein MusicMan comboforsterkari - alt bíliga til sølu.
Tlf. 313820

YNSKIST
Eigur nakar eina góða rytmuboks at selja mær fyri bíligan prís? Fyri uml. 1.000 kr. Tlf. 448073-283173

Út- & Sjónvarp

TIL SØLU
Eitt 25" sjónvarp av merkinum Telefunken og eitt video verður selt fyri 2.500 kr.
Tlf. 317565

Ymiskt

ANTIK
Ein gomul, svørt seymimaskina av slagnum Husqvarna til sølu.
Tlf. 314384 ella 220425

FARTELEFON
CD 160 GSM Motorola v/ tasku til sølu fyri 700 kr., telefonnr. fylgir við.
Tlf. 211445

FARTELEFON
Lítið brúkt Ericsson T10S til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 250606

FERÐ TIL SØLU
Ferð úr Keypmannahavn til Føroya tann 7. august bíliga til sølu.
Tlf. 40367646

FLOGFERÐASEÐIL
Hey! Er nakar, ið vil býta flogferðaseðil um við meg. Eg havi ein til 06.08.00 men vil fegin sleppa avstað fyrr enn hetta.
Ring 320545 ella 210398
um hetta er nakað fyri teg.

FLYTIGÓÐS
Eg havi ein tóman vørubil úr Keypmannahavn til Føroyar 19. august. Ert tú áhugaður at fáa flytigóðs við, so ring
Tlf. 215105

FLYTIGÓÐS!
Eg havi ein tóman vørubil sum skal frá Keypmannahavn til Føroyar tann 19. august. Er nakar áhugaður at fáa pláss fyri flytigóðsi, so ring til mín.
Tlf. 215105

GÁVUKORT
Virði: Olympus vørur fyri 3.000 kr. frá 3'aranum, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 317466,
Tróndur og Heini

GRAS
Um tú slær stykki í Hoyvík, eigur tú grasið.
Tlf. 373910

GRINDAKNÍVAR
Sera vakrir grindaknívar til sølu.
Tlf. 318678

HANDILSINNBÚGV
Komplett handilsinnbúgv v/ ljósamaturi til sølu. Hevur verið brúkt til ur og smykkur. Verður selt heilt bíliga. Sær ógvuliga gott út.
Tlf. 333447

HARMONIKUFERÐ
við Norrønu 21. aug. á 4-koyggjukamari v/ brúsi til sølu. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 443356, e. kl. 18

MOTORSÚKKLU KOYRIKORT
Nýtt teoriskeið til motorsúkklu byrjar í Klaksvík 7. aug.
Sigið frá á tlf. 220008

TEORISKEIÐ
Nýtt teoriskeið byrjar um miðjan august. Tekning á tlf. 217677.
Klaksvíkar Koyriskúli
v/ Manna W. Høgnesen

TIL SØLU
Tvey stór og tvey vanlig battarí, ein borðladari og ein vanligur ladari til eina Ericsson NMT 900 NH 238 til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 313722, Petur

TIL SØLU
Ein antikk byrsa til sølu til hægstbjóðandi.
Tlf. 444737

TIL SØLU
Ein altanhur, út, 72x193. Tvær altanhurðar, inn, 82x193.
Tlf. 316720 - 216720

TIL SØLU
27 føroysk telefonkort til sølu.
Tlf. 314384 ella 220425

RULLISKOYTUR
std. 45, til sølu fyri 350 kr.
Tlf. 318428

TIL SØLU
Apex ferðaseðil til Billund 16.8. kl. 13.45 bíliga til sølu.
Tlf. 316004 - 315572

TIL SØLU
Eitt lítið brúkt DSC-F55E Sony digital myndatól 2,1 megapixels, 4 mør. gamalt v/ tasku + 1 stk. 32 memory kort, óbrúkt, til sølu fyri 6.000 kr., nýprísur 9.315 kr., ella í býti við eitt Nikon speglrefleks myndatól.
Tlf. 282935

TIL SØLU
Ein mini cruise ferð til Bergen og aftur í 4-koyggjukamari við hondvaski til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 422352 ella 216352

TIL SØLU VEGNA FLYTING
6 mør. gamal vektbonkur við møguleika at venja beinini, 110 kg. av vektum, hondstengur og 180 cm stong, allar við lásum. Ring og hoyr meira.
Tlf. 316776

TRAPPA YNSKIST
Eiga tit eina trappu at selja mær? Um so er, ring
Tlf. 315152, e. kl. 18

TOYOTA-CUP
Fótbóltskapping á Argjum fyri børn og ung. Síðsta freist at melda til er 7. aug. á tlf. 284142 (Jóhan), ella 315476 (Thorvald). Luttøkugjald 300 kr.
Argja Bóltfelag

TRAPPA YNSKIST
Eiga tit eina beina trappu at selja mær, so ring
Tlf. 315152, best e. kl. 18

ÚTHURÐ/ALTANHURÐ YNSKIST
Eiga tit eina úthurð/altanhurð at selja mær? Um so er, ring
Tlf. 315152, eftir kl. 18

VINKULJØRN
15 stk. galvaniserað vinkuljørn, stødd 30x30x4, 75 cm long, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 313454 - 288454, e. kl. 17

YNSKIST
Mær manglar ein ferðaseðil til dóttur mína tann 5. aug. Føroyar-Billund kl. 13.45. Hevur tú ein ferðaseðil, tú ikki skalt nýta henda túrin, ynski eg at hoyra frá tær.
Tlf. 455876

YNSKIST
Eyka battarí og ladari til eina Ericsson GA 628 ynskist til keyps.
Tlf. 456318 ella 457955

YNSKIST!
Eg standi og mangli ein ferðaseðil tann 5.8. Føroyar-Billund kl. 13.45. Hevur tú ein, tú ikki skalt brúka, vil eg fegin hoyra frá tær.
Tlf. 455876

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

Stóra bringu -ella lítla?

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari

BERGUR Á REYNATRØÐ

Børkuvegur, 620 Runavík

Tlf. 448480

Stongt vegna summarferiu til 21. aug.

Álitið fer ongan veg!

Í desember í 1988, ella nærri: dagin fyri ta tiltiknu jólaódnina, varð eg settur í tað borgarliga starv, eg framvegis røki, og síðan tá hava m.a. føroyskir mentamálaráðharrar altíð havt mín stóra áhuga.

Hesi eru arbeiðsgevararnir hjá Landsbókavørðinum seinastu 13 árini

Tað sigur seg sjálvt, at táið tú í tólv ár hevur havt trettan mentamálaráðharrar sum arbeiðsgevarar, so er tað við ávísum spenningi, at tú eitt fríggjakvøld eftir ólavsøku ár 2000 setir teg at lurta eftir tí trettanda.

Undir viðgerðini av ólavsøkurøðu løgmans nú um dagarnar bíðaði eg tí spentur eftir at nýggi mentamálaráðharrin tók orðið.

Og hann ikki bara tók orðið. Hann tók øll á bóli. Ikki bara við sínum serstaka framburði og sínum djørvu hugskotum, men fyrst og fremst tí hann hevði fyrireikað seg bæði væl og virðiliga. Hann var ikki persónligur, men helt seg til evnið, og tað er eftir mínum tykki, ein stór dygd - eisini í føroyskum politikki.

Torbjørn Jacobsen legði fyri við at siga, at hann helt, at hansara málsøki hevði ikki verið serliga nógv frammi undir viðgerðini av løgmansrøðuni, og rætt er tað. Í hesum liggur kanska eisini ein partur av orsøkini til, hví tað tykist vera so torført at fáa mentamálaráðharrarnar at støðast í sessinum. Handaliga sæð, hendir ov lítið á økinum. Við so títtum skifti hevur tað nevniliga verið púra vónleyst at fingið nakran kontinuitet á økinum. –

Sum ein av teimum ið skrivaðu mentanarálitið 'Avmarkaður marknaður' (1996), var eg ómetaliga fegin at hoyra, at mentamálaráðharrin longu hevði kunnað seg um, hvat stendur í álitinum, tí í røðu sínari endurgav ráðharrin brot úr álitinum, uttan tó at varpa hetta út í hvønn krók. Eg haldi, at hetta var frálíkt. Hví hava embætismenn og onnur at skriva álit fyri teg, um tú ikki brúkar tilfarið?!

Tí undraði tað meg nógv at hoyra viðmerkingarnar aftaná frá fleiri av tingmonnunum. Orð sum háfloygd røða, jómfrúrøða og prát um, hvussu tann franska úttalan hjá ráðharranum var, vóru at hoyra. Hetta prátið av løgtingsins røðarapalli avdúkaði, at hóast lønirnar hjá tingmonnum eru farnar nógv stig upp, vil tað ikki siga, tað sama sum, at røðurnar eru vorðnar tilsvarandi betri. Viðmerkingar teirra avdúkaðu eisini, at teir ikki høvdu lisið mentanarálitið serliga væl. Men tað kunnu teir framvegis náa.

Álitið fer ongan veg!

Síðan mentanarálitið sá dagsins ljós, hevur ofta verið at hoyrt, at nú fer landsstýrið at orða ein mentanarpolitikk. Vit eru nógv,ið framvegis bíða í stórum spenningi.

Sum eitt kuriosum til síðst fari eg at nevna teir trettan ráðharrarnar, skuldi eg av ósketni havt gloymt onkran, so biði eg mirðiliga um umbering.

Landsstýrismenn í mentamálum 1988-2000:

Lassi Klein 5/4-1988 til 18/1-1989

Karl Heri Joensen 18/1-1989 til 22/6-1989

Signar á Brúnni 22/6-1989 til 15/1-1991

Marita Petersen 15/1-1991 til 18/1-1993

Jóannes Eidesgaard 18/1-1993 til 24/4-1993

Thomas Arabo eitt stutt skifti 1992/1993

Bergur Jacobsen 24/4-1993 til 15/9-1994

Sámal P. í Grund 15/9-1994 til 1/12-1997

Edmund Joensen desember 1997

Ivan Johannesen 1/1-1998 til mei 1998

Signar á Brúnni mai 1998 til apríl 2000

Høgni Hoydal apríl 2000 til 20/7 2000

Torbjørn Jacobsen 20/7-2000-

Eg fari at ynskja mínum trettanda mentamálaráðharra í tólv ár góða eydnu í starvinum. Hann hevur, ið hvussu er, orðið í síni makt, og fyri tað eigur eingin at lasta hann.

Martin Næs
5/8-2000

Flakavirkið í Vík skift eigara

Flakavirkið í Hakdarsvík hevur skift eigara. Nýggi eigarin er felag, sum føroyingar og útlendingar eiga saman

EDVARD JOENSEN

Haldarsvík: Flakavirkið í Vík hevur fingið nýggjan eigara. Gamli eigarin váttar, at nýggjur eigari hevur tikið við 1. august, men enn hevur eingin verið eftir lyklunum, sigur Anfinn við Hálsagarð, sum átti virkið í Vík.

Tíðindablaðið Sosialurin hevur frá øðrum keldum frætt, at millum nýggju eigararnar er stjórin í felagnum Vaðhorn á Strondum, Hjørleif Dahl.

Hjørleif Dahl hevur selt part sín í Vaðhorni til Føroya Fiskasølu. Samstundis hevur hann saman við øðrum stovnað nýtt felag, sum hevur keypt virkið í Vík. Í tí felagnum skulu eisini italiumenn vera við, vita keldur okkara at siga.

Vaðhorn, sum arbeiðir saltfisk, hevur millum annað selt til Italia, og tað skal vera okkurt av hesum handilssambondunum, sum er við í nýggja felagnum í Vík, frættir Sosialurin.

Sjálvur vil stjórin í Vaðhorni, Hjørleif Dahl, ikki siga nakað um helst. Líka mikið, hvat hann verður spurdur, er svarið: »Onga viðmerking«.

Anfinn við Hálsagarð, sum nú hevur selt flakavirkið í Vík, sigur, at har hava tey arbeitt saltfisk og skorið flak, sum er farið feskt avstað. Tey hava bara arbeitt í tí syðra húsinum. Tí eldra bygninginum. Tað hava arbeitt upp móti 20 fólkum á virkinum, sigur hann.

Men sum hann skilir, sigur Anfinn við Hálsagarð, er ætlanin hjá nýggju eigarunum at gera væl meira burturúr. Teir skulu eisini brúka norðara bygningin, sigur hann seg hava skilt.

Keldur, Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við, siga, at tað hevur verið nevnt, at eini 40 fólk fara at slepa til arbeiðis í Vík, tá nýggja virkið fer í gongd.

Anfinn við Hálsagarð, seljari, er ikki áhugaður í at siga nakað um prísin á virkinum, nú tað varð selt.

nøvn nú

Heilsanir

Sunnudagin hev›i henda daman ein rundan dag. Her slappar hon av umbor› á Norrønu. Annars er hon altí› í sving. Hjartaliga tillukku.

Heilsan nógv vinfólk og skyldfólk

nøvn nú 5 ferðir um vikuna 25,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: .....

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**